## Fólkatónleikur kring Føroyar

Við eini fjølbroyttari skrá fer Fólkatónleikarastevnan at ljóða kring landið frá 15.-23. juli. Í 2007 fevnir skráin um konsertir og dansikvøld við Gjógv, í Hósvík, Kirkju, Hattarvík, Runavík, Mykinesi og í Havn. Eisini er samstarv við G!-festivalin, so at nakrir bólkar úr fólkatónleikastevnuni eisini spæla har. Luttakandi bólkar og solistar eru: Dánjal á Neystabø, Kiezelmayer, Katrina Petersen, Ingun Simonsen, Markamót, Kvonn, Guðrið Hansdóttir og Budam. Eisini eru Folk Sessions í Hafnia Lounge sunnudagar í summar. Fólkatónleikastevnan varð fyrstu ferð hildin í 1984, og tað er Føroya Fólkatónleikarafelag, sum stílar fyri stevnuni.



# Chevron fer nú at kanna føroysku undirgrundina

**Ein umfatandi seismisk kanning av jarðfrøðiligu løgunum við markið byrjar í august. Kanningarnar verða gjørdar tætt við staðið, har manningin á Lómi herfyri sá gassloga umborð á boripalli**




*Trý av teimum mest týðandi leitiøkjunum á Atlantsmótinum hjá Chevron, har felagið áður hevur gjørt umfatandi seismiskar kanningar. Nú felagið eftir øllum at døma fer at fyrireika útbygging av oljukelduni Rosebank við markið, fer felagið longu í næsta mánað undir nýggjar seismiskar kanningar á føroyska landgrunninum.*

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Herfyri fór amerikanska oljufelagið Chevron undir royndarframleiðslu (testing) í einum avmarkingarbrunni á Rosebankleiðini skamt frá føroyska markinum í bretskum øki. Longu í næsta mánað fer sama felag saman við Statoil, Dong og OMV undir rættiliga umfatandi seismiskar kanningar føroysku megin markið í loyvi, sum feløgini fingu tilluttað í 2. útbjóðing. Hetta leitiðloyvið liggur uppat loyvinum í bretskum øki, har Chevron hevur gjørt eitt stórt oljufund.

Seismisku kanningarnar verða gjørdar sum ein fyrireiking til møguliga boring í 2008 ella 2009. Tað er norska felagið Wavefield Inseis, sum hevur fingið hesa uppgávuna, og fer eitt av skipum tess, Malene Østervold undir 2D seismisku kanningarnar í august.

Chevron stóð annars fyri nøkrum árum síðani (sí kort) fyri eini stórari seismiskari verkætlan á stórum parti av Atlantsmótinum, har seismikkur varð skotin í trimum ymiskum støðum, teirra millum á tí økinum við markið, har Chervron nú aftur fer undir at gera nýggjar kanningar.

Tað er eingin ivi um, at hesar kanningar hava samband við oljufundið, sum felagið hevur gjørt á bretskum øki stutt frá markinum. Tað hevur verið gitt, at oljukeldan kann vera báðumegin markið og ella at somu jarðfrøðilig viðurskifti eru bæði á tí bretska og tí føroyska landgrunninum.

Sum skilst fer Chevron í næstum at koma við einum tíðindaskrivi um royndarframleiðsluna á Rosebank. Er tað positivt, hvat tað eftir øll-um at døma fer at vera, og fara komandi seismisku kanningarnar á føroyskum øki at sannføra felagið um, at tað í føroyska loyvinum eru møguleikar at gera líknandi fund sum Rosebank, so eru hetta sera góð tíðindi fyri føroyskar oljumyndugleikar, ið síggja fram til, at meira virksemi verður á landgrunninum.

Rosebank kann eftir øllum at døma gerast lykilin til møguliga olju í føroysku undirgrundini eisini.



*Malene Østervold fer í næsta mánað at skjóta seismikk fyri Chevron á føroyska landgrunninum.*